SKYN

Nýtt

# Ikki bert ognir, men heim



## HOYVÍK
Sethús, Mannbrekka 7

200 | 1311 | 5

Sermerkt hús ovarlaga í Mannbrekku við fríum útsýni yvir Hoydalar og Nólsoyarfjørð. Uttanfyri er stórur og sera væl hildin urtagarður við flísum, fleiri sólkrókum og blómubedum. Húsini eru í fimm forskotnum hæddum. Inn frá vegnum er inngongd, køkur, spísistova, stova, skrivstova við durum út á altan og hjallur. Uppiá er kamar og sjónvarpsstova, og haðan eru nøkur trin upp til gongd, klædnarúm og trý kømur. Í teimum báðum niðastu hæddunum er baðirúm, fýrrúm, kjallararúm, goymslurúm, vaskirúm, skrivstova og stova við durum út á terassu. Húsini standa beint við Hoyvíkar skúla, dagstovn og handlar. Bilskýli hoyrir til ognina.

Prísuppskot: kr. 5.000.000








SENDISTOVAN

## TÓRSHAVN
Sethús, Bjarnoyarvegur 8



214 | 385 | 2 | 1972

Væl hildin hús í tveimum hæddum. Í ovaru hæddini er hjallur, gongd, baðirúm, køkur, stova og trý kømur. Í niðaru hæddini er stór inngongd, kamar, fýrrúm og kjallararúm. Til ognina hoyrir eitt stórt bilhús, og harafturat er stór terassa við sera góðum sólargangi. Takið varð skift í 1993, og vindeyguni eru frá 1992. Framman fyri húsini er ein vælrøktur urtagarður. Húsini standa í vesturbýnum, tætt við skúla, dagstovn og handlar.




Prísuppskot: kr. 2.300.000

## SANDAVÁGUR
Sethús, Heygagerði 3



146 | 631 | 1 | 2006

Nýggj og góð sethús í Sandavági. Húsini eru í einari hædd og hava gongd, vaskirúm, baðirúm, vesi, køk og stovu í einum og trý góð kømur. Bilhús og hjallur hoyra til ognina, og atgongd er til bæði bilhús og hjall frá vaskirúminum. Eisini er ovastaloft, sum kann innrættast, um kvistur verður gjørdur. Húsini standa í Heygagerði í Sandavági og hava sera gott útsýni yvir bygdina og fjørðin.




Prísuppskot: kr. 1.300.000